*Avgjørdur Terje Hagevang frá norska SAGA Petroleum:*

# Olja og gass í føroysku undirgrundini

*Sannlikt er, at tað finst bæði olja og gass í føroysku undirgrundini. Jarðfrøðiligu viðurskiftini eru av slíkum slag, at her eru møguleikar at kunna goyma bæði olju og gass. Føroyingar eiga at læra av norsku royndunum og síggja tað positiva, sum ein oljuvinna hevur við sær. Hetta er nakað av tí, sum ein av fremstu jarðfrøðingunum hjá norska oljufelagnum Saga hevur at siga eftir eina vitjan í Føroyum.*




*Terje Hagevang frá Saga ivast ikki í, at somu løgini, har olja er funnin á bretskum øki, halda fram inni á føroyskum øki. Saga er annars við í komandi oljuleitingini á djúpum vatni í Møre og Vøring, har teir hava góðar vónir um at finna olju. Hesi øki kunnu javnmetast við Føroyar og eisini Grønland*



*Saga er við í komandi Lopransboringini og rindar 2 mill. kr. fyri luttøkuna*

-Vit ivast ikki longur, men eru sannførdir um, at bæði olja og gass eru í føroysku undirgrundini.

Hetta sigur ein fremstu jarðfrøðingunum hjá privata norska oljufelagnum, Saga Petroleum, Terje Hagevang, sum júst hevur vitjað føroysku oljufyrisitingina fyri at greiða frá kanningarúrslitunum hjá felagnum á føroyskum øki umframt ætlanir í framtíðini.

Hvat grundar Terje Hagevang so hetta so avgjørdu úttalilsi á?

-Tað byggir á tað arbeiðið, sum Saga hevur gjørt á føroyskum øki. Jarðfrøðiligu viðurskiftini í føroysku undirgrundini eru av slíkum slag, at her eru møguleikar at kunna goyma bæði olju og gass.

Vit vita longu nú, at her eru "reservoirbergarter", "kildebergarter" og her eru helst eisini oljufellur tilstaðar.

Hvat viðvíkur tjúkku basaltflágunum, so tekur Saga tað meira sum eina avbjóðing heldur enn ein óloysiligan trupulleika.

Terje Hagevang sigur seg hava havt góðar samrøður við oljufyrisitingina undir vitjanini í Føroyum, men hann vil ikki fara út í, hvat teir hava tosað um.

Eitt nú vil hann ikki siga nakað um, hvar í føroyska økinum teir meta bestu møguleikarnar vera at finna olju.

Men tað hava vit sjálvandi sagt oljufyrisitingini.

Uppá fyrispurning um møguleikar eru at finna stórar oljukeldur – teir sokallaðu elefantarnar – í føroyskum øki á støðd við Ekofisk og Statfjord í Norðsjónum, sigur Terje Hagevang, at tað kann ein ikki útiloka.

-Vit vóna tað. Og tað er kanska heldur ikki heilt ósannlíkt.

**Marknatrætan loysast**

Saga Petroleum er eitt av teimum mongu útlendsku oljufeløgunum, sum hava stóran áhuga í føroysku undirgrundini. Felagið hevur keypt allar tær kanningar, sum eru gjørdar á føroyskum øki, eitt nú seismikkin hjá Western og kanningarnar hjá avstralska felagnum World Geoscience. Harafturat er Saga við í komandi Lopransboringini.

Royndirnar hjá Saga í Norðsjónum og serstakliga áhuga á at finna olju og gass í nýggju útbjóðingarøkinum út fyri Miðnoreg á djúpu Vøringleiðunum ger, at felagið heldur møguleikarnar vera góðar at finna olju og gass á Føroyaleiðini. Sagaserfrøðingarnir halda eins og serfrøðingarnir hjá eitt nú Statoil, at viðurskiftini í Vøring og við Føroyar eru rættiliga meinlík.

Men Terje Hagevang heldur tað hevur stóran týdning fyri føroyingar og ikki minst fyri oljufeløgini, sum vilja gera íløgur á føroyskum øki, at marknatrætan við bretar...

Eg haldi í hvussu er tað er neyðugt at fáa eina fyribils semju, soleiðis at virksemið kann byrja á føroyskum øki.

Terje Hagevang heldur annars, at tað er av týdningi, at føroyingar eru realistiskir, tá tað snýr seg um vónirnar til eina komandi oljuvinnu og ikki rokna við einum "mirakuli" nú beinanvegin.

Tit mugu líva við at taka eitt stig í senn. Tað tekur sína tíð at byggja upp eina oljuvinnu. Hetta eru royndirnar hjá okkum í Noregi. Í Noregi vórðu boraðir 33 brunnar, áðrenn lønandi framleiðsla kundi byrja.

**Føroyar tola væl eina oljuvinnu**

Men byggja vit at royndunum norðmenn hava havt við eini oljuvinnu í meira enn 20 ár, heldur Terje Hagevang, at eitt lítið samfelag sum tað føroyska tolir eina slíka nýggja vinnu.

Tað ivast eg onga løtu í. Føroyingar eru so mikið at sær komnir, at tit megna at taka ímóti eini slíkari avbjóðing.

Terje Hagevang vísir á, at teir í Noregi høvdu sama orðaskifti um ávirkan av eini oljuvinnu fyri 25-30 árum síðani og seinni.

Norðmenn eru samdir um í dag, at høvdu vit ikki




*Á kortinum síggja vit, hvar í norskum øki Saga og eisini onnur oljufeløg hava fingið lisensir í tí seinastu útbjóðingargrundini. Saga er tað felagið, sum er úti á størsta dýpinum, nevniliga 1400 metrum í Vøring bassenginum*

